

# Nýtt frálandaskip dálkar helvtina minni

Jan Müller

07.04.2014 - 14:40

Oljan.fo

Nýggja frálandaskipið hjá norska reiðarínum Farstad, Far Sirius, er útgjørt við tøkni, sum ger skipið munandi meiri umhvørvisvinarligt enn tilsvarandi eldri skip.

Sambært reiðarínum verður Far Sirius mett sum eitt av teimum mest umhvørvisvinarligu frálandaskipunum á marknaðinum. Millum annað er maskinaríið soleiðis háttað, at høvuðsskrúvurnar kunnu skifta ímillum dieselelektrisitet og dieselmekanikk ella brúka bæði ísenn. Hetta ger, at skipið brúkar munandi minni dieselolju, og tað ger, at skipið útleiðir nógv minni $CO_2$ og onnur dálkandi evni.

Herumframt hevur Far Sirius ymsar tekniskar loysnir, sum skerja nýtsluna og útlátið enn meira. Eitt nú eru loysnir, sum skerja nýtsluna hjá síðuskrúvum og pumpum, og katalysatorar taka meiri enn 90 prosent av NO-útlátunum.

**50 prosent minni**

Børge Nakken, sum er tekniskur stjóri hjá Farstad Shipping, sigur í tíðindaskrivi, at reiðaríið hevur fyrst og fremst hugsað um trygdina og umhvørvið, og at trygdin hjá manningini er raðfest fremst. Ein liður í hesum er, at manningarnar fáa alla neyðuga kunning um, hvussu umráðandi tað er at avmarka nýtsluna mest møguligt og á tann hátt at dálka sum minst.

Sambært metingum hjá reiðarínum dálkar Far Sirius umleið 50 prosent minni enn eitt tilsvarandi skip, sum er 15 ára gamalt.

Skrokkurin á Far Sirius er gjørdur í Rumenia, og skipið er gjørt liðugt á Langsten-skipasmiðjuni í Tomrefjord, sum eisini er eitt kent navn í føroyskari skipasøgu. Skipið er 87,40 metrar langt, 21 metrar breitt og hevur kostað reiðarínum góðar 600 mió. norskar krónur.

Farstad Shipping eigur 60 skip og hevur fýra skip í gerð.